

# Kundarøktari til Vodafone

**Vegna økt virksemi, søkja vit eftir einum dugnaligum, ágrýtnum, jaligum, ábyrdarfullum, fleksiblum og vaksnum fólki**

Ert tú kundavinarlig/ur, hevur tú góð samstarvsevnir, dugir at arbeiða sjálvstøðugt, eins væl og í bólkum, ert tú TANN vit sóknast eftir.

**Arbeiðið umfatar:**
– Kundatænastu
– Hjálp og vegleiðing av kundum
– Søla til privatkundar
– Søla og aktivering av talitíðar kortum
– Fyrifallandi skrivstovu arbeiði

Vit vænta at tú hevur royndir innan kundatænastu, hevur lætt við, og áhuga í at læra nakað nýtt alla tíðina.

Talan er um fulltíðarstarv við skiftandi arbeiðstíðum.

Lønin verður ásett eftir førleika og royndum. Starvið verður at seta hálvan sep. Spurningar um starvið kunnu setast til Karis 202020/502092

Umsóknir við CV, skulu sendast sum teldupostur til Karis innan 1. september á khj@vodafone.fo

vodafone

Vodafone FO veitir eitt breitt úrval at tænastum innan telesamskifti til stakkundar, vinnu og feløg fyri kappingarførar prísir. Vodafone FO hevur ment eina sterka fjarskiftisskipan í Føroyum og hevur í løtuni 35 fólk í starvi. Vodafone FO samstarvar við Vodafone Group, heimsins leiðandi altjóða samskipan innan fartelefonsamskifti, og er ført fyri at veita tænastur um allan heim. Vodafone FO er dótturfelag hjá Vodafone Iceland. Vodafone FO hevði ein umsetning í 2008 upp á DKK 100 mió.

# Havnar KFUK-skótar

## Vit byrja aftur 24. august

**Skótar og Ungdómsskótar**
mánadag kl. 1900 til 2100

**Spírur og Títlingar**
mikudag kl. 1630 til 1800

**Spírur**, eru gentur, fyltar 6 ár og 1. flokkur
**Títlingar**, eru gentur sum ganga í 2. til og við 4. flokki
**Skótar**, eru gentur sum ganga í 5. til og við 8. flokki
**Ungdómsskótar**, eru tey frá 9. flokki og eldri.

**Limagjaldið er einans kr. 180,- árliga.**

**Endamálið:** er at útinna skótaarbeiði samsvarandi alheims skótalóg og skótalyfti og at boða gleðiboðskapin fyri skótum og títlingum samsvarandi evangelisk-luthersku játtanini.



**Arbeiðsgrundarlag:** er gjøgnum skótaarbeiði at útvega tær best møguligu treytir fyri einum felagsskapi, har frælsi fyri einstaklingin er størst møguligt, samstundis sum ein átekur sær ábyrgd fyri felagsskapinum. Samsvarandi skótalóg og -lyfti vil skótarørslan, við sínum arbeiði á tjóðskaparligum og alheims stigi hjálpa skótunum at virka fyri góðum vinalagi tjóðanna millum.

Hevur tú hug at gerast KFUK-skóti, ert tú vælkomin í skótahølini í KFUK, Varðagøtu 9 nevndu dagar.
**www.123hjemmeside.dk/kfuk-skotar**




FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

## Stakskeið á masterstigi á Søgu- og Samfelagsdeildini á Fróðskaparsetri Føroya

Nøkur pláss eru eftir á masterskeiðnum: ***Føroyar í 21. øld: Politiskar avbjóðingar.***

Byrjað verður 26. august. Meira kunning á heimasíðuni: www.setur.fo

**FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA**
**Setursskrivstovan · tlf. 35 25 00 · J. C. Svabos gøta 14**
**Postrúm 272 · 110 Tórshavn · www.setur.fo**

# Ársaðalfundur

Arbeiðsmannafelagið Framtíðin hevur ársaðalfund í húsunum hjá Matmøðrafelagnum leygardagin kl 19.00.

Um fundurin ikki er viðtøkuførur verður eykaaðalfundur ½ tíma seinni.

Av tí at okkurt heitt verður til matna, verða menn bidnir at boða frá í seinasta lagið mikudagin, at teir koma á fundin, á tlf 580954 ella 573068

Lesið Sosialin -tað loysir seg